# Tjanningar í nærum hvørjum felagi

*Hóast flestu feløgini royna at styrkja seg við leikarum uttan ífrá, so vísa hagtølini eisini, at feløgini samstundis royna at nýta egna framleiðslu á fyrstudeildarliðnum*

Tað er vanligt, at nógv nýggj ung andlit eru at síggja í 1.deild í byrjanini av landskappingi, men soleiðis hevur ikki verið higartil í ár..

Bert í fýra feløgum (KÍ, HB, B68 og FS Vágum) finnast leikarar undir tjúgu ár, ið hava spælt í bestu deildini fyri fyrstu ferð. Tað skal tó leggjast afturat, at í fjør vóru teir tríggir vágamenninir, sum framganga av hjáløgdu talvu, fastir fúsir í aðru deild.

19 tjanningar, ella tineygjarar, hava higartil spælt í teimum fyrstu umførunum í 1.deild, og tólv teirra eru meira ella minni kendir millum áskoðarar frá undanfarnu kappingunum.

NSÍ hevur havt nógv tað besta unglingaliðið tey seinnu árini, og tí er ikki løgið, at fýra runavíkingar, sum enn ikki hava fylt 20 ár, eru komnir á besta NSÍ-lið.

Toftamaðurin Jann Ingi Petersen, ið kom inn á vøllin í 2.hálvleiki í 1-3 tapinum móti B36 seinasta vikuskifti, gjørdist tann yngsti leikarin í bestu deildini higartil. Hin evnaríki U-16 landsliðsspelarin er føddur so seint, sum í 1984, og er sostatt 16 ára gamal.

Eisini liðfelagi hansara á U-16 landsliðnum, Símun Joensen, hevur fingið royndir í 1.deild. Klaksvíkingurin spældi allan seinna hálvleik í Gundadali í 0-1 tapi ímóti HB.

Tór-Ingar Askelsen er blivin yngsti málskjúttin í 1.deild eftir tvey umfør. Sandavágsmaðurin, ið eisini hevur drúgvar landsliðsroyndir í ymiskum aldursbólkum, skoraði eitt av málunum hjá FS Vágum í dystinum ímóti NSÍ, sum endaði 3-3.

Tór-Ingar er tó ikki eins ungur og teir báðir omanfyrinevndu (hann fylti 19 ár mánadagin) og neyvan megnar hann at varðveitta hetta metið ígjøgnum alt kappingarárið.



*Súni Olsen er millum teir ungu leikarar, sum nú mugu roknast sum fast innbúgv í fremstu deildini*

Tað er bara ein annar tineygjari, ið hevur gjørt mál í 1.deild í ár. Gøtumaðurin Hans Pauli Petersen skoraði í evstu løtu til 2-0 á Sarpigerði ímóti sumbingum.

Yngsti leikarin í 1.deild í fjør, sandingurin Kristoffur Vidtfeldt (hann er føddur tann 24.juni 1983), hevur enn ikki verið at sæð í nøkrum landskappingardysti fyri sítt felag í 2000.

IE

Tjanningar, sum higartil hava spælt við fyrstu deild hetta kappingarárið, býttir á feløg

| | | |
|---|---|---|
| **NSÍ** | | |
| Brynjolvur Nielsen | 18 | 08.01.82 |
| Jann Nónklett | 19 | 10.01.81 |
| Sonni L. Petersen | 19 | 04.11.80 |
| Christian Høgni Jacobsen | 19 | 12.05.80 |
| **Sumba** | | |
| Hallur Dam Joensen | 18 | 07.03.82 |
| Sonne Kjærbo | 19 | 18.01.81 |
| Mortan úr Hørg | 19 | 21.09.80 |
| **FS Vágar** | | |
| Tór-Ingar Akselsen* | 19 | 01.05.81 |
| Sjúrður Ellefsen* | 18 | 22.10.81 |
| Jack Johansen* | 18 | 29.01.82 |
| **HB** | | |
| Jón Rói Jacobsen | 17 | 07.04.83 |
| Janus Joensen* | 18 | 24.05.81 |
| **KÍ** | | |
| Símun Joensen* | 16 | 12.07.83 |
| Hjalgrím Elttør* | 17 | 03.03.83 |
| **GÍ** | | |
| Súni Olsen | 19 | 07.03.81 |
| Hans Pauli Petersen | 19 | 29.07.80 |
| **B68** | | |
| Jann Ingi Petersen* | 16 | 07.01.84 |
| **B71** | | |
| Kári Nielsen | 19 | 03.03.81 |
| **VB** | | |
| Palli Augustinussen | 19 | 16.12.80 |

**B36 eingin**
(yngstir eru 20-ára gomlu Tróndur Vatnhamar og Herbert í Lon Jacobsen)

* spældu í 1.deild á fyrsta sinni

# Útlendingar minni sjónligir

*Higartil í ár hava útlendsku leikararnir ikki hava somu avgerandi ávirkan sum undanfarnu árini. Í øllum førum tá rað ræður um at skjóta mál*

25 mál er skorað í teimum báðum fyrstu umførunum í 1.deild í 2000.

Merkisvert er, at bert tvey av heum málunum eru skotin av teimum útlendsku leikarum, sum hetta kappingarárið eru at síggja í Føroyum.

Tað er ikki nógv, tá talan er um meiri enn tjúgu spælarar, og tá bert tveir teirra (Waldemar Nowicki úr B71 og Remi Mikoliunis úr FS Vágum) eru málverjar.

Í fjør skoraðu útlendingar 55 mál av 311 í 1.deild, og í 1998 var talið 50 av 385. Sostatt hevur teirra lutur verið nógv meira sjónligur undanfarnu árini.

Hinvegin vísa royndirnar, at leikarum uttanifrá torvar ávísa tíð fyri at etablera seg í føroyskum fótbólti. Tvey tey fyrstu umførini bæði í 1998 og 1999 skoraðu útlendingar trý mál í part, men sum kappingin fráleið, gjørdust teir nógv vandamiklari í brotssteigunum hjá mótstøðuliðum.

Kortini blivu tey bæði útlendsku málini í 2000 verið avgerandi fyri úrslitini í teimum dystunum, har tey vóru skorað.

Pólverjin Robert Cieslewicz gjørdi sigursmálið hjá VB í lokaluppgerðini móti sumbingum í 1.umfari, og síðsta sunnudagin bjargaði Darius Magdisauskas einum stigi fyri FS Vágar vesturi í Sørvági, tá ið hann javnaði í yvirtíðini ímóti NSÍ.

Darius gjørdist tann allarfyrsti spælari úr Litava, ið hevur skorað í føroyskum fótbólti, men ikki tann fyrsti úr fyrrverandi sovjetisku londunum.

Í 1994 skoraði russin Eduárd Apálkov 5 mál fyri B36, og fýra ár seinni gjørdi landsmaður hansara, Andréy Stakhánov, 6 mál fyri B68.

IE



*Enn hava útlendsku leikararnir ikki gjørt so nógv um seg við málskjótingini hetta kappingarárið*

## AaB framum Ferfølge

Í fínum fótbóltslíkindum hevði AaB í Aalborg mánakvøldið vitjan av grannaliðnum úr Viborg. Heimaliðið vann 1–0. Málið skoraði Søren Frederiksen í 1. hálvleiki.

At AaB fekk trý stig hevði við sær, at teir komu uppá síðuna av Herfølge í stigum. Bæði liðini hava 44 stig, tvey færri enn oddaliðið í Brøndby. AaB er frammanfyri Herfølge, tí teir hava betri málmun. Tað eru seks umfør eftir at spæla í superliguni. Herfølge lá á toppinum eftir níggju umfør, og nú eru teir á triðja plássi.

JH

# Fimm minuttir um at gera mál



*Eddie Mikkelsen gjørdi skjótt av, tá hann varð sendur á vøllin í Sørvági*

Eddie Mikkelsen úr NSÍ spældi í mesta lagi fimm minuttir ímóti FS Vágum, men tað var nóg mikið fyri hann at gera mál. Runavíkingurin kom inn á vøllin seint í dystinum í Sørvagi, og hann kláraði at skora til 3-2 fyri gestaliðið, sum seinni vísti seg ikki at vera sigursmálið.

Tað kemur fyri viðhvørt, at einum innskiftum leikara krevst ikki nógva tíð fyri at koma á málskjúttaralista.

Meiri sjáldsom var hendingin í Fuglafirði í fjør, tá innskifti gøtumaðurin Hans Pauli Petersen skoraði eitt av fimm málunum í 5-1 sigrinum hjá GÍ á grannunum, ÍF. Hans Pauli spældi eisini einar fimm-seks minuttir í tí dystinum, og hetta var einastu ferð hann var á vøllinum í bestu deildini í 1999!

Í ár er ungi gøtumaðurin við at finna ein fastan sess á GÍ-liðnum, og sunnudagin sítt næsta mál í bestu deildini.

Eisini tað málið, í 2-0 sígrinum á Sumba, kom seint í dystinum, men hesaferð var Hans Pauli Petersen á vøllinum allar 90 minuttir.

IE




zarepta

ZAREPTA 2000

Familjulegurnar í ár ver›a hesar tí›ir:

| | Frá: | Til: |
|---|---|---|
| Familjulega I | Ley. 27/5 | Frí. 2/6 |
| Familjulega II | Ley. 3/6 | Frí. 9/6 |
| Familjulega III | Ley. 10/6 | Frí. 16/6 |
| Familjulega IV | Ley. 17/6 | Frí. 23/6 |
| Familjulega V | Sun. 20/8 | Ley. 26/8 |

**Tekning á tlf. 423037**
**frá mikudegi 03.05 kl. 19.00**

SUMMARMÓTAFRAMSÝNING Á HOTEL NORÐ

Nú summari nærkast og tey nýggjastu klæðini eru komin heim, er møguleiki at koma til

**SUMMARMÓTASÝNING**
**Leygarkvøldið 6/5 2000 kl. 19.00**



Komið og síggið hvat er frammi nú.
Til matna verður kalt borð.
Tað er eisini møguleiki at gista fyri ein rímiligan prís.

Bílegging á tel. 451244 ella 451093 og fax 451245 í seinasta lagi fríggjadagin kl. 12.00

Hotel Norð
Tel. 451244 - Fax 451245 - FO 750 Viðareiði

Sosialurin - 311820

**Kranførari**

Søkt verður eftir kranførara til lastbil við nýggjum 25 t/m HIAB krana.

Starvið verður sett beinanvegin. Nógv arbeiði er til kranføraran.

J & K
P/F J. & K. Petersen
Tlf. 315060 · Fax 314194

**Heitlufts-aggregat til flest øll endamál**

- Refleks oljuovnar til bátin, summarhús o.a.
- Hoyggjturkarar til turkan av græsið - serframleitt til Føroysk viðurskifti!
- Gasovnar
- Hitakanónir
- Avfugtarir

Vit útvega eftir tygara tørvi!

Tosið við okkum!

Kaj Andreasen & Co
Sandvíkarhjalli
Tel. 315600 - Fax 318008

Sosialurin - 311820

VEGG SAGING
Hurðar,vindeygu, veggir, garðar o.a.

HOL SAGING
Frá Ø 24 mm. til Ø 450 mm.

GÓLV FRESING

GÓLV SLÍPING

GÓLV SAGING
Rennir, keiøki, asfalt, upptøka og burturbeining o.a.

FØROYA BETONG SAGING v/Hjaltur Tausen
Gerðisvegur • 620 Runavík • Tel. 447543 • Fax 448898

Sosialurin - 311820

fk




GRAVSTEINAR OG KANTSTEINAR.
NÚ EISINI ÚR FØROYSKUM GRÓTI

Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið

**Til útisetar í Danmark**
Vit kunnu seta gravsteinar upp í Danmark uttan eyka kostnað

Danstein
Gravsteinar, kantsteinar og blómubeð

Skjót levering

Tel. 318323
Tel. 447512
Tel. 217512
Fax 449961

RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN
www.danstein.fo

*Halt* sosialin